# Vestmenningar spenna seg út




*Froyur stendur í góðum fýra milliónum, nú hann liggur klárur í Vestmanna*
Mynd: Edvard Joensen



*Snotuligi bygningurin hjá Vestmanna Ferðavinnufelag , Fjørukrógvin*
Mynd: Edvard Joensen



*Louis Kristensen er stjóri og kokkur á Fjørukrónni*
Mynd: Edvard Joensen

## Ein nýggjur ferðafólkabátur og nýggj matstova og kunningarstova vórðu víst fram á samkomu í Vestmanna fríggjadagin

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:** Nýggja matstovu og kunningarstovu fyri tvær milliónir og nýggjan ferðafólkabát fyri fýra milliónir kundu vestmenningar sýna fram á samkomu fríggjadagin.

Fjørukrógvin er heitið á bygninginum, sum Vestmanna Ferðavinnufelag hevur bygt á havnarlagnum, har skúrarnir hjá teimum, sum sigla Eystur undir Land, fyrr stóðu.

Tað eru teir fýra Louis Kristensen, Gunnar Skúvadal, Poul Erik Johannesen og Áki Johansen, sum í felag hava bygt hetta húsið.

Umfram snotuliga matstovu við tilhoyrandi nýmótans køki, er eisini kunningarstova við sølubúð í húsinum.

Bygningurin kostar, sum hann stendur, einar tvær miliónir, sigur Gunnar Skúvadal. Men tá er bara niðara hæddin innrættað.

Loftið er stórt og stendur óbrúkt at byrja við. Men har eru góðir møguleikar til at gera eitthvørt. Eitt nú at innrætta til gisting, sigur Gunnar Skúvadal, sum tó leggur afturat, at í fyrsta umfari verður einki gjørt har.



*Gunnar Skúvadal er væl nøgdur við nýggja bátin hjá felagnum Skúvadal*
Mynd: Edvard Joensen

Á vegginum í Fjørukrónni er stórur málningur av Vestmannabjørgunum, sum Pauli Vang í Havn hevur málað. Og hann hevur eisini eina framsýnign hangandi í húsinum, nú latið verður upp.

Samstundis sum Fjørukrógvin varð sýnd fram, varð eisini nýggi túrbáturin, Froyur, hjá felagnum Skúvadal, sýndur fram.



*Sóleyð Poulsen, leiðari á kunningarstovuni í Fjørukrónni, greiðir John Eysturoy, leiðari á kunningarstovuni hjá Ferðaráðnum, frá snotuliga húsinum*
Mynd: Edvard Joensen

Talan er um ein spildurnýggjan bát, sum felagið hevur latið gera í Íslandi, sigur Gunnar Skúvadal, stjóri.

Báturin, sum er gjørdur úr glastrevjum, er 13,4 metrar langur og 4,2 metrar breiður. Hann er innilokaður, og hevur 43 sitipláss undir taki, sigur Gunnar Skúvadal. Ferðin, sum teir báðir motorarnir upp á 575 HK hvør kláraðu á royndartúrinum, var 28 míl, sigur hann. Ætlanin er at seta setur upp á taki eisini, so fólk kunnu sita úti, meðan siglt verður fram við landinum. Froyur kostar góðar fýra milliónir krónur, sigur Gunnar Skúvadal.

Hóast hesin báturin er væl størri enn teir báðir, Urðardrangur og Barbara, sum felagið frammanundan hevur, er eingin trupulleiki at fara við honum inn á barmar og gjáir undir bjørgunum.



*Tað er sum at sita í bussi inni í salongini umborð á Froyi*
Mynd: Edvard Joensen

Umframt vanligu dagtúrarnar, sum sigldir verða við ferðafólki, sum vil síggja seg um, verður nú pláss fyri einum dagligum fiskitúri við øðrum av eldru bátunum, sigur Gunnar Skúvadal. Tað verður tó ikki so, at báturin heilt verður tikin úr hinari siglingini, men fer eisini av og á at sigla við fólki fram við landi.